*Saga helt arbeiðsfund í Havn:*

# Oljufólk hildu ólavsøku



*Tey fimmSagafólkini uttan fyri Hotel Hafnia. Terje Hagevang, kanningarstjóri í miðjuni*

JAN MULLER

Stórur áhugi er millum norsk oljufeløg at vera við í leitingini eftir olju og gassi við Føroyar. Eitt av teimum virknu feløgunum, sum sær stórar møguleikar her, er Saga Petroleum.

Fyritøkan er við í Loprans-boringini og hevur annars útvegað sær seismiskt tilfar, sum tað hevur tulkað.

Men talan er ikki bert um olju, tað snýr seg eisini um at læra fólk, mentan og náttúru at kenna.

Fyri at røkka hesum málum setti Føroyabólkurin hjá Saga sær fyri at halda ein kombineraðan arbeiðsfund og ferju í Føroyum um ólavsøkutíð.

-Hetta hava vit verið ómetaliga fegin um. Eitt fantastiskt upplivilsi at vera á Vaglinum á ólavsøku og hoyra og síggja øll hesi glaðu fólkini syngja sigur Terje Hagevang, kanningarstjóri hjá Saga við Sosialin.

Tey irða seg ikki eina løtu um, at tey valdu at koma til Føroya júst um ólavsøkutíð. Tvørturímóti.

Men tíð var eisini til annað enn ólavsøkuhugna. Á ferðini nýttu tey eisini høvi at tosa við føroyskar oljumyndugleikar.

Saga er eitt av teimum oljufeløgunum, sum veruliga roknar við, at olja er við Føroyar. Hetta byggja tey á tulking av seismikki og annars á tær royndir og kanningar, sum fyritøkan hevur frá líknandi økjum í Noregi her serliga Vøringbassenginum úr fyri Miðnoregi.

Saga er í løtuni í ferð við at finna sær nøkur oljufeløg at arbeiða saman við á Føroyaøkinum. Støðan er tann, at Saga ynskir sjálvt at vera operatørur á føroyskum øki.

Vit vera aftur í Føroyum um mánaðarskiftið august-september og tá vóni eg, at vit kunnu kunngera, hvørji feløg vit fara at arbeiða saman við sigur Terje Hagevang við Sosialin.

NÝTT - SMART

SMEKKU-BUKSUR
litað cowboy, gult, orange og svart
std. 6–16 ár
Einans 199,-

DADDAN
í miðbýnum
L. DEBESARGOTA 6
Tlf. 12138

*Felagið Tórshavn:*

## Gongutúrur á Borðoynni

Felagið Tórshavn skipar fyri gongutúrum fyri limirnar í felagnum. Flestu túrarnir eru sjálvsagt í Havn og í Suðurstreymoy, men annars hava gongutúrar verið víða um í Streymoy og Eysturoy, og 3 túrar hava higartil verið á Vágoynni. Higartil hevur bert ein túrur verið í Norðuroyggjum, í fjør, tá 50 fólk vóru á Skarði, nøkur komu til gongu úr Haraldsundi, meðan tey flestu fóru um skarðið úr Kunoy. Gongubólkurin setti sær tá fyri at gera túr aftur í ár til Norðuroyggjar og at ganga av Norðoyri eystur á Skúvadal, eitt yndisstað fyri gonguhugað í Klaksvík og Norðoyggjum annars.

Túrurin verður sunnudagin 11. august, og farið verður av Farstøðini í Havn kl. 9.35, og komið verður ikki aftur til Havnar fyrr enn kl. 20.45. Neyðugt er við tilmelding, og luttakarar verða biðnir um at hava góð gonguklæði, mat og kaffi við. Kend fólk úr Klaksvík fara at vísa leið og greiða frá mongum av tí, ið er at síggja á túrinum.

# Nú er spennandi hjá Simonu

*Mánadagin skal tann unga Simona á Argjum dystast við 11 danskar gentur um at gerast ársins supermoddell og sleppa víðari til USA at kappast við 33 aðrar stjørnur*



*Mynd: ALT for damerne*

RANDI JACOBSEN

Tað ræður um at halda seg til, og tað gjørdi 18 ára gamla Simona Midjord á Argjum.

Hon sá, at danska vikublaðið ALT for damerne hevði eina kapping um ársins supermodell.

Sum meira enn 500 aðrar ungar gentur í ríkinum sendi Simona inn myndir av sær, og Eileen Ford var so hugtikin av Simonu, at hon valdi hana út til finaluna.

12 gentur komu í finaluna. Tær hava allar verið til royndarfotografering sum modellir, men mánadagin so er tað álvari.

Tá skulu tær allari royna eg á eini størari mótaframsýning í Bella Centrinum í Keypmannahavn. Har verða mótafakfólk, sum fara at hyggja at, meðan tær ungu modellirnar vísa seg og nýggjasta mótan frá mótahúsinum Sand fram.

Sýningin verður klokkan 12, og tað er ein atturlatin sýnd bara fyri fakfólk. Tó hevur ALT for damerne lutað burtur 100 atgongumerki til finaluna.

Simona Midjord sigur við ALT for damerne, at hon altíð hevur droymt um at blíva modell, men tað er ikki sum at siga tað, av tí at hon býr í Føroyum. Fegin gjørdist hon, tá hon læs um kappingina, og ovfarin, tá hon varð vald út til finaluna.

Pápa Simonu dámar einki, tí hann vil hava hana at gera seg liðnan á studentaskúlanum. Bæði foreldrini fara tó við til finaluna fyri at rópa koyr á.

Um Simona vinnur kappingina og gerst ársins supermodell í Danmark, skal. skal hon í november til USA at kappast við 33 aðrar stjørnur úr øllum heiminum um heitið Supermodel Of The World.

Og tann stjørnan hevur tryggjað sær sáttmála við Ford Models í New York við 1,5 mió. krónum í inntøku í trý ár og við øllum heiminum sum arbeiðspláss.